## Andstøðan vann

Eitt gamalt navn í kypriskari søgu hvørvur nú av politiska pallinum á oynni - í hvussu er av ovastu rók.

Tað hendi um vikuskiftið, tá tann gamli leiðarin hjá griksku kyprunum, Glafkos Klerides, noyddist at viðurkenna, at hann hevði tapt forsetavalið. Klerides fekk 39 prosent av atkvøðunum, meðan leiðarin hjá andstøðuni, Tassas Papadopoulos, fekk 51,5 prosent. Andstøðan er sett saman av mið- og vinstraflokkum.

Eygleiðarar á Kypros siga, at valúrslitið fer ikki at bøta um útlitini fyri at fáa enda á stríðnum millum tann grikska og tann turkiska partin av oynni.

## Ongan stuðul til USA

Uttanríkisráðharrarnir í Arabisku Samgonguni samdust um vikuskiftið um eina fráboðan, sum sigur, at londini fara ikki at stuðla einum møguligum álopi á Irak.

Í fráboðanini stendur millum annað, at einki av londunum í samgonguni eigur at lata amerikanarar nýta sítt lendi til nakað, sum kann hótta trygdina og ræðisrættin hjá Irak. Sagt verður, at eitt møguligt álop á Irak kann koma trygdini í øllum teimum arabisku londunum í vanda.

USA verður ikki nevnt í fráboðanini, og har stendur heldur einki um tiltøk ímóti Kuwait, Qatar og Bahrein, sum hava loyvt amerikansku hermegini at búgva seg til álop haðani. Tað er eisini vert at leggja afturat, at fráboðanin er ikki bindandi fyri londini í Arabisku Samgonguni, og tí hevur hon ógvuliga avmarkaðan týdning.

## Turkar vilja hava meiri pengar

Amerikanskar keldur vilja vera við, at stjórnin í Washington hevur boðið Turkalandi 42 milliardir krónur í hjálp umframt 140 milliardir krónur í lánum, afturfyri at amerikanarar sleppa at nýta turkiskar herstøðir í tí ætlaða álopinum á Irak.

Turkiska stjórnin hevur loyvt amerikanarunum at nútíomansgera herstøðirnar, men stjórnin hevur tó ikki sagt beinleiðis, at støðirnar skulu nýtast í einum kríggi við Irak. Turkiskir politikarar hava víst á, at Flógvakríggið í 1991 kostaði turkiska búskapinum nógv, og tí krevja teir, at amerikanarar skulu rinda meiri enn tað, sum teir higartil hava boðið sær til at rinda.

Seinasta fríggjadag var turkiski uttanríkisráðharrin, Yasar Takis, í Washington, har hann hitti george W. Bush, forseta, men tað eydnaðist teimum ikki at semjast um, hvussu nógv Turkaland skal hava afturfyri at lata amerikanarar nýta herstøðirnar.

## Rushdie framvegis deyðadømdur

Í Iran hava myndugleikarnir gjørt av, at deyðadómurin ímóti rithøvundinum Salman Rushdie skal standa við. Í einari kunngerð frá kollveltingarráðnum í Teheran stendur, at deyðadómurin ímóti Rushdie er ævigur, og at eingin hevur myndugleika at seta hann úr gildi.

Salman Rushdie varð dømdur til deyða í Iran í 1989, eftir at hann hevði givið út skaldsøguna "Satanisk ørindi". Síðani hevur Rushdie fjalt seg ymsastaðni í Bretlandi, har hann býr, og sambært bretskum bløðum hevur hann meiri enn 30 loyniligar adressur kring alt Bretland.

Ovasti leiðarin í iranska kollveltingarráðnum er landsins andaligi leiðari, Ali Khaminei. Iranski forsetin, Muhammad Khatami, segði fyri tveimum árum síðani, at deyðadómurin ímóti Salman Rushdie mátti metast at vera farin úr gildi, men hetta hava teir víðgongdu við Ali Khaminei á odda sýtt fyri at góðtaka.

# Blair kann fáa trupulleikar



*Tony Blair skal ansa sær. Stuðulin til amerikansku ætlanina at leypa á Irak kann fara at kosta honum dýrt.*

**Ikki færri enn 750.000 fólk gingu um vikuskiftið mótmælisgongu í London, har tey mótmæltu ætlanini um álop á Irak. Tað kann geva Tony Blair trupulleikar.**

KRÍGSMÓTMÆLI
*Árni Joensen:*

Eygleiðarar í Bretlandi halda, at tann stóra undirtøkan, sum mótmælistiltakið í London fekk, kann koma Tony Blair, forsætisráðharra í ta ringastu politisku kreppuna nakrantíð.

Eingin hevur enn tosað um stjórnarskifti, men politiskir eygleiðarar í London eru á einum máli um, at Blair situr á einari politiskari knívsegg, eftir at hann at kalla treytaleyst hevur tikið undir við amerikansku stjórnini og ætlan hennara at leypa á Irak. Eygleiðararnir siga, at tað avgerandi verður, um Bretland fer at taka undir við einum amerikanskum uppskoti um at geva Saddam Husssein ein allarseinasta møguleika, og at USA skal fáa loyvi at leypa á, tekur irakski forsetin ikki av.

Blaðið The Observer skrivaði í gjár, at heldur Blair fram við at hanga í halanum á amerikanarunum, fara partar av flokki hansara at gera uppreistur, samstundis sum summir av ráðharrum hansara fara at leggja frá sær.

# Ætla at nýta ólóglig vápn

**Amerikanarar ætla at nýta ólóglig biokemisk vápn í krígnum við Irak, skrivar eitt bretskt blað.**

ÓLÓGLIG VÁPN
*Árni Joensen:*

Fyrr í hesum mánaðinum segði amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, at amerikansku herdeildirnar ætla at nýta "ikki drepandi" biokemisk vápn í tí ætlaða álopinum á Irak. Verjumálaráðharrin kom við hesari upplýsingini undir einari hoyring í Senatinum.

Rumsfeld segði, at ætlanin er at nýta hesi vápnini ímóti irakskum sivilfólki, ella um tað verður neyðugt at taka fangar. Hann upplýsti, at á hernaðarmáli verða hesi vápnini umrødd sum "doyvandi" vápn.

Tveir av teimum fremstu vápnaserfrøðingunum í Bretlandi, professararnir Alistair Hay og Julian Perry-Robinson, siga við blaðið The Independent, at vápn av hesum slagnum eru ólóglig sambært sáttmálanum frá 1992 um kemisk vápn og Geneve-sáttmálanum frá 1928, sum bannar londum at nýta kemisk evni ímóti fólki í krígstíð.

- Tað hevði verið heilt burturvið, gera amerikanarar av at nýta slík vápn. Kríggið ímóti Irak hevur júst til endamáls at forða fyri, at slík vápn verða nýtt, sigur Alistair Hay við The Independent.

Teir báðir bretsku professararnir, sum báðir eru ráðgevar hjá heimsheilsustovninum WHO, ávara ímóti teimum avleiðingum, sum hesi vápnini kunnu hava. Teir vísa millum annað á, hvat hendi, tá teir servandu russisku hermenninir lupu á leikhúsið í Moskva, har kekenar høvdu tikið fleiri hundrað gíslar. Russisku hermenninir nýttu doyvandi kemiskt evni við tí úrsliti, at 127 fólk doyðu av eitran.

Sambært Hay og Perry-Robinson hava bretsku myndugleikarnir ávarað USA ímóti at nýta slík "doyvandi" vápn í tí ætlaða krígnum við Irak, tí tað hevði verið í stríð við almennan bretskan politikk at nýtt vápnini, siga teir.







*Samstundis sum amerikanska stjórnin fyrireikar seg til kríggj við Irak, gingu fleiri milliónir fólk mótmælisgongu ímóti krígsætlanini. Hendan myndin er úr San Fransisco, har fleiri hundraðtúsund fólk mótmæltu krígsætlanini.*

# USA sleikir síni sár

**Innihaldið í frágreiðingunum hjá Hans Blix og Mohamed AlBaradei var ikki tað, sum amerikanska stjórnin hevði vónað, og frágreiðingarnar hava skert møguleikarnar hjá USA. Men kortini er ivasamt, um George W. Bush, forseti fer at bíða við at taka avgerð, sjálvt um Frakland vil hava eina frágreiðing afturat tann 14. mars.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, noyddist at nýta sínar drúgvu royndir frá sínum hermannalívi fyri at fjala misnøgdina og vreiðina, meðan hann sat í ST-trygdarráðnum og lurtaði eftir teimum báðum frágreiðingunum. Tí tað var týðiligt, at innihaldið hóvaði honum ikki.

Generalurin, sum gjørdist diplomatur og síðani uttanríkisráðharri, var uttan iva komin á fundin í teirri ivaleysu vón, at tað fór at eydnast honum at sannføra hini 14 umboðini um, at nú var nóg mikið tosað, og at neyðugt var at nýta ta hermegi, sum amerikanarar og bretar hava savnað við Persaflógvan.

Ístaðin noyddist amerikanska sendinevndin at leggja oyruni til tvær frágreiðingar, sum lótu næstan allan iva koma Irak til góðar. Fleiri lond, sum frammanundan vóru sinnað at stuðla USA og Bretland, broyttu kós, samstundis sum mótstøðulondini við Fraklandi á odda kendu seg styrkt til at halda fram við sínum sjónarmiðum.

Í fyrsta umfari segði Colin Powell, at hann skuldi tosa við forsetan um støðuna, og at amerikanska stjórnin eisini fór at ráðføra seg við aðrar stjórnir. Eygleiðarar í New York søgdu alt fyri eitt, at hetta var eitt tekin um, at amerikanska stjórnin var vorðin í iva um, hvat hon skuldi gera.

### Bíðar neyvan

Undan fundinum í trygdarráðnum seinasta fríggjadag væntaðu Hvítu Húsini, at tað fór at bera til at fáa ein meiriluta í trygdarráðnum at samtykkja, at Irak hevur brotið samtykt nummar 1441. Tað var greitt, at eitt ella fleiri av limalondunum fóru at velja at nýta sýtingarrættin, men kundi USA kortini fáa meiriluta fyri sínum sjónarmiðum, kundi tað metast sum ein sigur og styrkja ætlanina um at leypa á Irak. Aftan á frágreiðingarnar frá vápnaeftirlitsmonnunum halda eygleiðarar tað vera ivasamt, um USA torir at leggja eitt nýtt uppskot fyri trygdarráðið. Skuldi tað hent, at stjórnin legði eitt uppskot fram, og at Frakland, Russland og Kina nýta sýtingarrættin ímóti tí, hevði tað verið ein álvarsamur diplomatiskur ósigur fyri amerikansku stjórnina og ikki minst George W. Bush, forseta, siga eygleiðararnir.

Tað er eisini ógreitt, hvørjar møguleikar amerikanska stjórnin fær, skuldi trygdarráðið valt at tikið undir við franska uppskotinum um, at vápnaeftirlitsmenninir skulu lata trygdarráðnum enn eina frágreiðing tann 14. mars. Tað, sum avmarkar møguleikarnar hjá USA, er, at franski uttanríkisráðharrin hevur gjørt greitt, ætlanin er ikki at lata 14. mars vera nakra seinastu freist hjá irakum. Tvørturímóti hevur hann sagt, at Irak eigur at fáa ein møguleika afturat at ganga krøvunum hjá vápnaeftirlitsmonnunum á møti, og at tann 14. mars eiga eftirlitsmenninir so at gera upp, hvat irakar hava gjørt, og hvat er eftir.

Við øðrum orðum kunnu irakar fáa eina freist afturat. Enn hava amerikanarar ikki sagt sína almennu hugsan um uppskotið hjá Dominique de Villipin, men eygleiðarar halda tað vera ivasamt, um Bush er sinnaður at bíða líka til tann 14. mars. Tað er heldur ikki vist, at forsetin er sinnaður at bíða til tann 1. mars, tá vápnaeftirlitsmenninir skulu lata teimum fimm føstu londunum í trygdarráðnum eina frágreiðing.

### Nærri avgerðini

Okkurt var kortini í frágreiðingini hjá Hans Blix, sum amerikanska stjórnin kann fegnast um. Millum annað segði sviin, at arbeiðið hjá vápnaeftirlitsmonnunum kann avgreiðast skjótt, bara irakar vísa tann neyðuga samstarvsviljan. Blix tók eisini undir við amerikanska sjónarmiðinum um, at tað eru ikki vápnaeftirlitsmenninir, sum skulu finna tey ólógligu vápnini, men at tað áliggur iraksku myndugleikunum at at vísa eftirlitsmonnunum, hvar vápnini eru. Eisini vísti Hans Blix á, at irakar hava fleiri rakettir og rakettmotorar, sum eru ólógligir sambært ST-samtyktum, og at bæði rakettirnar og motorarnir skulu fyribeinast. Sýta irakar fyri at ganga hesum kravinum á møti, fer tað at styrkja amerikansku støðuna.

Eygleiðarar eru á einum máli um, at tað ber framvegis til at finna eina diplomatiska loysn á Irak-kreppuni, hóast amerikanarar og bretar hava savnað einar 150.000 hermenn við Persaflógvan. Amerikanska stjórnin hevur gjørt greitt, at tað er ikki neyðugt við einari ST-samtykt afturat fyri at seta eitt hernaðarátak í verk, tí tann heimildin liggur í samtyktini, sum trygdarráðið gjørdi einmælt tann 8. november.

Frágreiðingarnar, sum vápnaeftirlitsmenninir løgdu fyri trygdarráðið seinasta fríggjadag, hava ivaleyst tryggjað eftirlitsmonnunum meiri tíð í Irak, men tær hava samstundis gjørt, at George W. Bush, forseti er nú nærri tí degi, tá tann endaliga avgerðin verður tikin.